Álit

í

løgtingsmáli nr. 49/2025: Uppskot til løgtingslóg um at byggja sambýli til vaksin við autismu við Rygsá á Argjum

Fráfarni landsstýrismaður í almanna- og mentamálum, Eirikur í Jákupsstovu, hevur lagt málið fram 28. november 2025, og eftir 1. viðgerð 9. desember 2025 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 6. og 9. januar 2026.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýriskvinnuna í almanna- og heilsumálum, Margit Stórá, saman við Almannaverkinum og Landsverki.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið snýr seg um at byggja eitt sambýli til vaksin við autismu við Rygsá á Argjum. Lógaruppskotið er liður í at loysa stóra bústaðartrupulleikan hjá fólki, ið bera brek og hava tørv á vardum bústaði.

Sambýlið við Rygsá er sambýli, ið verður bygt til vaksin við autismu. Tørvur er á at hava eitt heim til vaksin við autismu at flyta í, tá tey gerast 18 ár.

Sambýlið við Rygsá verður til fólk, sum hava miðal til tungan tørv, har sum meginparturin krevja støðugan stuðul og umsorgan alt samdøgrið, og sum hava tørv at fáa serliga lívd, eitt nú í mun til ljós og ljóð. Við hesum uppskoti fáa vaksin við autismu munandi betri umstøður, ið eru sniðgivnar til teirra tørv, og hóskandi karmar um tann frið og privatlív, sum tey hava rætt til og tørv á.

Útreiðslurnar til verkætlanina kunnu í mesta lagi vera 115 mió. kr. Talan er um 24 nýggj pláss harav átta eindir eru skermaðar og fara at kunna nýtast til einstaklingafyriskipanir. Ætlanin er at niðurleggja tríggjar lítlar stovnar, har tilsamans 13 borgarar búgva, og írestandi 11 plássini verða tøk at minka bíðilistan við, og munar hendan bygging veruliga fyri minkingina av bíðilistanum.

Hyggja vit at rakstrarkostnaðinum, so økist hann við góðum 5 mió. kr. fyri nýggja sambýlið, men tá skal havast í huga, at farið verður frá 13 búplássum til 24 búpláss. Hyggja vit nærri at rakstrarkostnaðinum, so framgongur at prísurin pr. brúkara í áðurnevndu sambýlum er 1,1 mió. kr. um árið, og við nýggja stovninum lækkar rakstrarkostnaðurin til 0,82 mió. kr. pr. pláss um árið, t.e. ein lækking á uml. 25%.

Tað skal eisini havast í huga, at hóast kostnaðurin pr. pláss lækkar, so fer tænastustøðið at hækka munandi. Her er talan um góðar umstøður til borgaran við egnari nútímans íbúð við vesi og egnari inngongd. Harumframt vera umstøðurnar eisini skipaðar betur við fakfólki innan reingerð og matgerð umframt húsavørð.

MEGD tekur undir við uppskotinum og fegnast um, at Autismufelagið hevur verið hoyringarpartur í allari tilgongdini, og at MEGD eisini hevur fingið høvið at luttaka.

Undir viðgerðini er komið fram, sbr. fylgiskjal 3, at fermetraprísurin er 64.000 kr., og at alt er íroknað, undir hesum eisini byggibúning av gott 1/3 eyka grundøki, ið skal nýtast til at byggja verkstað eftirfylgjandi.

Fermetraprísurin fyri hondverkaraútreiðslurnar sbrt. fylgiskjali 3 er góðar 39.000 kr.

Bygningurin er 2.090 m^2 og grundøkið er 9.250 m^2. Ráðgevin hevur teknað sambýlið soleiðis, at pláss eisini er fyri verkstaði á sama grundøki. Lagt er upp fyri, at hesar báðar verkætlanir kunnu brúka felags hentleikar so sum innkoyring, stórkøk, ruskpláss og parkering.

Í samband við byggiverkætlanina hava royndirnar frá Sambýlinum í Kvíggjartúni, ið er til børn og ung við autismu, víst, at smalar gongir og ljóð millum íbúðir vísir seg at kunna viðføra konfliktir. At bygningurin er eittplans, og bilar tí kunnu lýsa inn, hevur víst seg at skapa óróð.

Hesar royndir hevur man tikið við, og innrættingin er gjørd soleiðis, at man kann minka um harðskap og konfliktir. Tí verður talan um serstakar karmar, ið eisini økja um byggikostnaðin. Haraftrat er bygningurin lagaður til lendið og er í trimum hæddum.

Víst hevur eisini verið á, at bygningurin skal hava serstakar umstøður, tá ið tað kemur til ljós- og ljóðviðurskifti, umframt at stórur dentur verður lagdur á trygdina við rýmingarleiðum v.m.

Viðvíkjandi at húsavørður til stovnin er íroknað rakstrarkostnaðin, so er upplýst, at Fíggjarmálaráðið hevur mælt til at leggja upp fyri húsavarðatænastu, tá ið bygt verður nýtt. Tað er ein sannroynd, at í nýmótans bygningum er nógv tøkni, og hetta krevur støðuga tænastu, so skipaninar rigga eftir ætlan.

Upplýst er fyri nevndini, at við framflyting og játtan á fíggjarlógini fyri 2026 er nóg mikið av peningi til byggingina í ár, og á løguætlanini fyri 2027 stendur peningur til verkætlanina, sum tá verður liðug.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 26. januar 2026

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Ingilín D. Strøm
Dennis Holm	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	